# ítróttur

Nr. 22 • leygardagur • 1. februar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


# So er dreymurin veruleiki

**Fríggjadagin eftir døgurða skuldu Jón Rói Jacobsen og Brøndby gera sáttmála, sum komandi hálva árið bindur landsliðsmannin at felagnum**

YRKISTILVERA
*Jákup Mørk*

Hóskvøldið komu so fótbóltstíðindini, sum hava upptikið stóran part av føroyska fótbóltsprátinum seinastu vikuna ella so. Brøndby og HB eru komin ásamt um leiguavtalu um Jón Róa Jacobsen, og nú er so alt riggað til, soleiðis at eitt nýtt føroyskt superligaævintýr kann byrja, mest sum samstundis sum eitt annað tykist enda.

- Enn er undirskriftin ikki komin upp á pláss, men tað er so tað einasta, sum manglar. Míni viðurskifti við Brøndby eru longu avgreidd, so seinastu tíðina havi eg bert bíðað eftir, at feløgini skuldu semjast um teirra viðurskifti, segði ein fegin Jón Rói Jacobsen, tá vit hóskvøldið fingu orðið á hann.

## Drúgv bíðitíð

Og leikarin sjálvur viðgongur nú eisini, at talan hevur verið um sera drúgva bíðitíð fyri sítt viðkomandi.

Stutt fyri ársskiftið var hann nakrar vikur í Brøndby, og longu tá stóð sáttmálin honum í boði.

- Ja, tað er einki at ivast í. Hetta hava helst verið longstu vikurnar í lívinum. Ikki minst tá tað um jóltíðir var líkt til, at steðgur kom í málið, tí hetta hevur jú alla tíðina verið tað, sum eg havi ynskt.

Spurdur, um hetta eisini hevur viðført, at hann onkun tíð hevur havt hug at missa mótið, ella møguliga at leita eftir øðrum møguleikum, sigur hann, at tað hevur hann tó ikki.

- Eg havi alla tíðina trúð upp á møguleikan, og tí havi eg roynt at verið tolin. Hetta eru jú ikki ting, sum verða avgjørd her og nú. Tað tekur sína tíð, og hóast tað kann kennast møðsamt soleiðis at bíða, so vísti tað seg í øllum førum at loysa seg.

## Verjuleikari

Tað var danska Ekstra-Blaðið, sum fyri viku síðani bar boðini um, at nú vóru HB og Brøndby um at gera semju viðvíkjandi Jón Róa. Hetta hendi um sama mundið, sum Peter Madsen varð útleigaður, og í donsku bløðunum varð gitt, at Jón Rói skuldi koma beinleiðis inn á álopsplássið hjá hesum.

Í HB hevur Jón Rói jú fyri tað nógva verið álopsmaður, meðan talan á landsliðnum hinvegin hevur verið um pláss í miðverjuni. Og sjálvur ivast Jón Rói ikki í, at tað er sum verjuleikari, at hann nú er komin til felagið.

- Tað gangi eg so bara útfrá. Ta tíðina eg vandi við teimum og spældi á eykaliðnum, var tað so alla tíðina sum verjuleikari. At Ekstra-Blaðið skrivar meg í álopið, má so standa fyri teirra egnu rokning.

## Hart arbeiði

Sum sagt, so skuldi Jón Rói vera við fríggjadagsflogfarinum til Danmarkar, har sáttmálaundirskrivingin skuldi fara fram. Síðani verður farið mest sum beina leið til Turkalands, har Brøndby fer á venjingarlegu, og so er bara eftir at sannføra Michael Laudrup um, at føroyingurin er rætti maðurin at seta á liðið.

Spurdur, hvørt hann hevur fingið nakra ábending um, at hann skal beinleiðis inn í superliguhópin, sigur Jón Rói, at tað hevur hann ikki.

- Tað verður hart arbeiði. Tað ivist eg ikki í, men hinvegin ivist eg heldur ikki í, at við neyðuga hepninum er tað eitt mál, sum er gjørligt at røkka, og tað er so tað, sum eg fari eftir.

Seinasti – og fyri nógv tann mest forvitnisligi – spurningurin, sum vit settu Jón Róa, áðrenn vit ynsktu honum góða eydnu á ferðini, var sjálvandi tann um fíggjarliga partin av avtaluni. Er talan um eina avtalu, sum í einum ger føroyska unglingin til millióning?

- Nei. Tað er tað so ikki. Ein slík leiguavtala er so ikki tað, sum nakar verður ríkur av. Eg fái tó so mikið, at eg klári meg, og so má eg bara vóna, at eg standi meg somikið væl, at eg kann fáa ein ordiligan sáttmála í summar.




*- Hetta hava helst verið longstu vikurnar í lívinum, sigur Jón Rói um bíðitíðina, síðani hann fyrst í desember kom aftur til Føroya, eftir at hava vant nakrar vikur við Brøndby*

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 02.02 | 14.30 | Kyndil-StÍF |
| 02.02 | 15.00 | Stjørnan-Neistin |
| 02.02 | 15.00 | VB-VÍF |

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 01.02 | 16.00 | H71-VÍF |
| 02.02 | 16.00 | Kyndil-StÍF |
| 02.02 | 16.00 | KÍF-Neistin |

**Flogbóltur**

Meistaradeild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 01.02 | 13.00 | Fleyr-ÍF |
| 01.02 | 15.00 | TB-Fleyr |
| 02.02 | 13.00 | KÍF-Dráttur |

Meistaradeild menn

| | | |
|---|---|---|
| 01.02 | 15.00 | Mjølnir-ÍF |
| 02.02 | 14.00 | SÍ-Fram |





# So er gullfuglurin flogin

**Í HB varð alla tíðina roknað við, at Jón Rói skuldi til Brøndby, og hóast missin av einum týðandi leikara, so eru bert positivar meldingar at hoyra**

FRÁGONGD
*Jákup Mørk*

Hóast Jón Rói Jacobsen sjálvur heldur, at talan var um ógvuliga drúgva bíðitíð, so var leiðslan í HB ongan tíð í stórvegis iva um, at talan fór at gerast um handil av onkrum slag við Brøndby.

- Vit høvdu alla tíðina ein sera positivan dialog við Brøndby, og tí høvdu vit alla tíðina eina góða kenslu. Um jóltíðir ella har á leið kom kanska eitt sindur av einum steðgi í, men sjálvur var eg alla tíðina sannførdur um, at hetta mundi fara at ganga, og tað sama haldi eg eisini var galdandi, fyri hini í leiðslu felagsins, sigur Birgir Enghamar. Formaður í HB.

- Ikki minst seinastu tíðina hava vit verið heilt róligir í so máta. Talan var bert um einstakar smálutir, sum skuldu rættast til, men vit vildu tó ikki melda nakað út, fyrr enn alt var komið í rættlag.



*- Vit vildu á ongan hátt standa í vegin fyri Jón Róa, og tí var týdningarmikið, at alt gekk rætt fyri seg, sigur formaðurin í HB*

## Lágan profil

Einki er at ivast í, at gitingarnar og søgurnar hava verið nógvar seinastu tíðina. Onkur um at avtala longu var gjørd, og aðrar um at einki hendi kortini, men hetta hevur formaður felagsins sum so onga viðmerking til.

- Tað er so ikki nakað, sum vit fáa gjørt stórvegis við. Aloftast verður roynt at frætta ymiskt, og bløðini skulu jú eisini seljast, men vit hava fyri tað mesta roynt at hildið lágan profil, og so lata onnur um at gita. Hetta var jú ein handil, sum vit øll vildu hava skuldi ganga væl. Vit vildu á ongan hátt standa í vegin fyri Jón Róa, og tí var týdningarmikið, at alt gekk rætt fyri seg.

Og tað letur eisini til, at formaðurin heldur lágan profil, tá tosað verður um, hvørt talan er um ein handil, sum felagið fær milliónir í kassan av.

- Har hava vit eina greiða avtalu um, at hetta er eitt mál millum okkum og Brøndby. Eg kann tó gott siga so mikið sum tað, at vit halda talan er um eina góða avtalu fyri allar partar. Ikki minst soleiðis sum marknaðurin er háttaður í løtuni.

Hóast eingin fæst at váttað, akkurát hvussu avtalan er sett saman, so er lítið at ivast í, at talan er um leigusáttmála við eini framman undan avtalaðari upphædd um sølupening, um talan verður um handil í summar. Brøndby hevur júst gjørt líknandi avtalu um Peter Madsen, har felagið hevur møguleika at fáa 15 mió.kr. í illa sperda kassan um hálvt ár, og er ein møguligur handil helst treytaður av, hvussu hetta spælir av, ella um aðrir leikarar møguliga verða seldir til ta tíð.

# Todi í Fraklandi

**Hósdagin var Todi Jónsson í Lille, har hann var til læknakanning hjá lokala felagnum, sum spælir í bestu fronsku deildini**

YRKISFÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir øllum at døma skiftir Todi Jónsson felag, áðrenn europeiska evstamarkið fyri leikaraskifti rennur út á midnátt fríggjakvøldið.

Hósdagin vistu franskir miðlar at siga, at Todi Jónsson var til royndarvenjingar hjá Olypique Lille, men seinni um kvøldið kom ein áhugaverd rættleiðing til hesi tíðindi. Umboðsmaðurin hjá Toda Jónsson, Carsten Aabrink segði tá við Ritzau, at talan ikki var um royndarvenjing, men at Todi var til læknakanningar hjá franska felagnum. Ein slík er vanliga seinasti formaliteturin, áðrenn sáttmáli verður undirskrivaður, og tí er lítið at ivast, at ætlanin er at gera sáttmála millum partarnar.



*Todi Jónsson er bókstaviliga ávegis úr spælaratunnlinum hjá FCK. Hóskvøldið var hann til læknakanningar hjá Olympique Lille í Fraklandi*

Fyri Toda er einki at ivast í, at hetta er loysn, sum hóvar honum betri, enn útlitini fyri at sita á beinkinum í FCK í hálvt ár. Bæði tí hetta vildi verið ein heldur óhugalig støða, og ikki minst vildi hetta ikki verið nakar serliga góður máti at lýsa fótbóltsevni síni.

Fyri FCK er talan heldur ikki um nakra vánaliga loysn. Felagið hevur áður gjørt greitt, at tá leikarars soleiðis eru á veg úr felagnum, skulu teir ikki rokna við nakrari spælitíð, og felagið kann ivaleyst spara nakrar hundrað túsund krónur á lønarkontini, um Todi longu nú skiftir felag, ístaðin fyri at ganga við fullari løn í hálvt ár, uttan at felagið fær nakað afturfyri.

Hartil kann FCK við hesum fáa nakrar krónur í kassan fyri ein leikara, sum kortini hevði farið fyri einki um fimm mánaðir, so fyri allar partar líkist hetta best hugsandi loysnini.

Olympique Lille er í løtuni á 14. plássinum í bestu fronsku deildini. Seinnu árini hevur felagið við eyðkendum kontrafótbólti staðið seg óvæntað væl í fronsku deildini, men í ár hava trupulleikar verið. Ikki minst, tí fleiri av álopsleikarum felagsins hava verið skaddir, og við tí í huga, er lítið at ivast í, at teir fegnir vilja hava ein kvikan álopsmann til felagið sum skjótast.

Hóskvøldið royndu vit at fáa orðið á Toda Jónsson, men hetta eydnaðist okkum ikki.

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 3 | 2 - 1 - 0 | 354 | 280 | 74 | 13 |
| 2 | VB | 2 | 2 - 0 - 0 | 360 | 302 | 58 | 13 |
| 3 | Stjørnan | 2 | 1 - 0 - 1 | 297 | 298 | -1 | 10 |
| 4 | Kyndil | 2 | 1 - 0 - 1 | 336 | 338 | -2 | 8 |
| 5 | StÍF | 2 | 0 - 1 - 1 | 324 | 352 | -28 | 7 |
| 6 | Neistin | 3 | 0 - 0 - 3 | 294 | 322 | -28 | 5 |
| 7 | Tjaldur | 2 | 1 - 0 - 1 | 280 | 353 | -73 | 3 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 405 | 323 | 82 | 11 |
| 2 | StÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 350 | 298 | 52 | 9 |
| 3 | Neistin | 1 | 0 - 0 - 1 | 365 | 336 | 29 | 9 |
| 4 | KÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 331 | 353 | -22 | 7 |
| 5 | Kyndil | 1 | 0 - 0 - 1 | 343 | 348 | -5 | 6 |
| 6 | H71 | 1 | 1 - 0 - 0 | 327 | 379 | -52 | 5 |
| 7 | Tjaldur | 1 | 0 - 0 - 1 | 321 | 405 | -84 | 3 |

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 114 | (23) |
| Asta Petrauskiene | StÍF | 108 | (34) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 102 | (36) |
| Simona Dziugyte | Neistin | 97 | (29) |
| Danijela Ercevic | Stjørnan | 95 | (27) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 93 | (48) |
| Milica Ergic | Tjaldur | 92 | (19) |
| Reda Kurkauskiene | VB | 91 | (13) |
| Lenka Ribaric | Tjaldur | 71 | (19) |
| Natasja Stamenkovic | Stjørnan | 69 | (3) |
| Alina Olaru | StÍF | 69 | (7) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 62 | (1) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 60 | (6) |
| Ileana Manolescu | Kyndil | 51 | (9) |
| Poula D. Olsen | StÍF | 50 | (4) |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 114 | (14) |
| Damir Oros | KÍF | 93 | (20) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 90 | (2) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 88 | (15) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 86 | (21) |
| Ingi Olsen | VÍF | 79 | (18) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 78 | (7) |
| John Zachariasen | VÍF | 72 | |
| Áki Olsen | VÍF | 64 | (5) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 58 | (12) |
| Finnur Hansson | Kyndil | 56 | (10) |
| Áki Mørk | Neistin | 55 | (13) |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 53 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 51 | (18) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 50 | |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 14 | 12 - 2 | 40 | 15 | 25 | 16 |
| 2 | Mjølnir | 14 | 11 - 3 | 37 | 14 | 23 | 15 |
| 3 | TB | 14 | 10 - 4 | 35 | 15 | 20 | 12 |
| 4 | Dráttur | 14 | 5 - 9 | 20 | 35 | -15 | 5 |
| 5 | Fleyr | 14 | 3 -11 | 13 | 35 | -22 | 5 |
| 6 | KÍF | 14 | 1 -13 | 8 | 39 | -31 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 11 | 10 - 1 | 31 | 5 | 26 | 12 |
| 2 | Mjølnir | 11 | 7 - 4 | 23 | 16 | 7 | 9 |
| 3 | Fram | 11 | 6 - 5 | 22 | 17 | 5 | 8 |
| 4 | SÍ | 11 | 5 - 6 | 17 | 20 | -3 | 7 |
| 5 | Fleyr | 12 | 0 -12 | 1 | 36 | -35 | 0 |